# Starv á Lønardeplinum á Føroya Gjaldstovu

Eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvi frá 1. juni í 2009 til 15. februar í 2010 og tí søkja vit eftir fólki at byrja 1. juni ella so skjótt sum til ber.

**Uppgávurnar eru at:**
- skráseta og málsviðgera lønir
- koyra lønir
- rætta lønir
- bóka lønir
- svara lønarfyrispurningum

Viðkomandi sum situr í starvinum hevur umframt tikið sær av at ráðgeva um lønarskipanina, gera úttrekk úr skipanini og seta í verk webb-partin av lønarskipanini.

**Krøv til starvið:** EDV-skipanir stuðla øllum arbeiðinum á Gjaldstovuni og tí er tað ein fyritreyt, at tað liggur væl fyri hjá tær at brúka EDV og at seta teg inn í nýggjar loysnir. Formlig útbúgving er ikki kravd, men hevur tú júst lokið HH útbúgving e.t., so er hetta ein møguleiki. Royndir á lønarøkinum er annar møguleiki. Hevur tú skrivstovuútbúgving/bankaútbúgving er hetta ein upplagdur møguleiki at royna teg á lønarøkinum. Tú skalt vera álítandi, røkin og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett alt eftir útbúgving, royndum og førleika. Meira fæst at vita um starvið frá Guðny Simonsen, sum er at hitta á tlf. 352410 ella 214965.

**Umsókn:** Umsóknir við prógvum og møguliga viðmælum skulu verða send Føroya Gjaldstovu, Traðagøtu 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 15. mai í 2009.

**Um Gjaldstovuna:** Virksemisøkið á Gjaldstovuni verður í løtuni broytt, so Gjaldstovan, umframt at hava kjarnaførleika í løn, roknskaparhaldi o.t. eisini skal hava kjarnaførleika í KT.

**Gjaldstovan verður skipað í fýra høvuðsøki:**
- Lønardepil (seta upp lønarskipan, lønarbókhald, ráðgeving og leiðslukunning)
- KT-fyrisiting (net, felags loysnir, samskipa fakskipanir, ráðgeva og gera avtalur)
- Roknskapardeild (yvirskipaðar roknskaparuppgávur, bókhald, gjaldingar og leiðslukunning)
- Kervisfyrisiting (reka Búskaparskipan landsins).

Í Lønardeplinum starvast 7 fólk. Lønardepilin hevur um hendi stóran part av almennu lønaravgreiðslunum og tænastumannaeftirlønunum. Depilin umsitur stamdata í Felags Lønarskipanini og ráðgevur í at brúka skipanina.

Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan hevur flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

Í løtuni eru um130 brúkarar í Felags Lønarskipanini.

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**

Sosialurin
www.sosialurin.fo




# Lærarastørv í Viðareiðis Skúla

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2009:**
- 1 fast fulltíðarstarv
- 1 tíðaravmarkað fulltíðarstarv vegna lækkað tímatal og avlopstímar
- 1 tíðaravmarkað fulltíðarstarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi – fram til 18. des. 2009
- Møguliga 1 starv á umleið 6 avlopstímar. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sep.
- 1 stuðul við pedagogiskari ábyrgd 22 tímar um vikuna. Uppgávan er at virka sum stuðul hjá næmingum við serligum tørvi.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í:**
- føroyskum, donskum og enskum
- støddfrøði, náttúru/tøkni og lívfrøði
- kristni og søgu
- handaverki og list
- tónleiki og ítrótti
- flokslærari í 1. fl.
- flokslærari í 6. og 7. fl.

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2.

Stuðulsstarvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi, c.v. og møgulig viðmæli skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. mai kl. 12.00.

Viðareiðis Skúli
Heygavegur 7
FO – 750 Viðareiði

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 23 10 80.

**Í Viðareiðis skúla** Viðareiðis skúli hevur komandi skúlaár 55 næmingar frá 1. – 7. flokk. 7 lærarar og ein stuðul starvast í skúlanum. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid

# Tiltøk í mai 2009

**Í apríl mánaði verða skúlaframførslur úr Listaleypinum: "Fronsk klovnasýning A&O" og "Ein listatúrur á Sandi"**

| Dagur | Dato | Tiltøk | Kl. |
|---|---|---|---|
| Fríggjad. | 1. | **Á Segloftinum á Tvøroyri: Jazzkvøld: Fagrir Fuglar og K-trio.** Suðuroyar Tónleikafelag skipar fyri. (DK/FO/IS) | 21.00 |
| Leygard. | 2. | **Framsýningin hjá Pernille Mejlskov** (DK) við musikk-tekningum úr Føroyum - til og við 24. mai 2009. Bólkurin Fagrir Fuglar spæla til upplatingina | 16.00 |
| Leygard. | 2. | **Konsert: "Markleysa lívið" við Lena Maria Klingvall,** (DA/SE) Suð og 17 sangarar Atgm. Kr. 150,00 | 19.30 |
| Sunnud. | 3. | **Dupult Jazzkonsert við K-Trio og "KapKass and the Poulsens"** Ókeypis atgongd (ÍS/FO) | 16.00 |
| Týsd. | 5. | **Harmonikukonsert v/Lista Trekkspillklubb** frá Farsund í Noregi. Ókeypis (NO) | 16-18.00 |
| Hósd. | 7. | **"Føroya Feitasta Stuðuls-konsert"** (FO) Atgm. Kr. 200,00 Innsavning til hjálpararbeiði | 19.30 |
| Fríggjad. | 8. | **Dýri biðidagur:** Húsið er opið frá NLH 26 ár | 14-17.00 |
| Mánad. | 11. | **Javnstøðunevndin og Demokratia í Norðurlanda-húsinum** við almennum fyrilestri, sum rithøvundurin Hanne-Vibeke Holst heldur. Atgm. Kr. 100,00 (FO) | 19.30 |
| Týsd. | 12. | **Javnstøðunevndin og Demokratia Í Mentanar-húsinum** Almennur fyrilestur - rithøvund. Hanne-Vibeke Holst luttekur Atgm. Kr. 100,00 (FO) | 20.00 |
| Týsd. | 12. | **Ráðstevna:** Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar (FO) | 12-18.00 |
| Hósd. | 14. | **Konsert: v/Duo Stimmhorn í Mentanarhúsinum í Fuglafirði** Atgm. Kr. 100,00 (FO/SZ) | 20.00 |
| Leygard. | 16. | **Konsert v/ Duo Stimmhorn í Norðurlandahúsinum** Atgm. Kr. 100,00 (FO/SZ) | 16.00 |
| Leygard. | 16. | **Nordisk Kunstforbund - Føroysk Myndlistafólk. Fundur** | 10-18.00 |
| Sunnud. | 17. | **Fyrilestur í talu og myndum: "Lívið á motorsúklu"**(DK) við Tinu Rasmussen og Hjalte Tin | 16.00 |
| Sunnud. | 17. | **Norskur tjóðardagur** (NO) | |
| Hósd. | 21. | **Kristi Himmalferðadagur** Húsið er opið frá | 14-17.00 |
| Hósd. | 28. | **Samvit: Ráðstevnu innan nýmenning í fiskivinnuni** (FO) | 10-16.00 |
| Fríggjad. | 29. | **Konsert: Mezzoforte** (IS) Atgm. Kr. 270,00 | 21.00 |
| Sunnud. | 31. | **1. Hvítusunnudagur** Húsið er stongt | |

***Nærri kunning um tiltøkini á www.nlh.fo***

***Broytingar kunnu koma fyri!***

**Norðurlandahúsið er opið**
mán. – leyg kl. 10.00-17.00 & sunnud. kl. 14.00-17.00.

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Tel 351351 · Fax 315350 · www.nlh.fo · nlh@nlh.fo